# Meira enn 100 fólk knýtt at oljuboring




*Kort av boringini á Williamleiðini*

*Kelda BP*

**WILLIAMBRUNNURIN**

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Veðrið hevur verið so mikið til vildar seinastu dagarnar, at BP í morgin setir á at bora Williambrunnin har suðuri á landgrunninum. Umleið 100 fólk eru til arbeiðis á Transocean Rather, nú farið verður undir enn eina spennandi og avgerandi leitiboring á landgrunninum. Teirra millum eru eisini tveir føroyingar. Annar teirra er sjúkraystur og hin er løgreglumaður. BP hevur gjørt avtalu við Atlantsflog um at flyta fólk av pallinum til flogvøllinum, men tyrlan verður ikki klár fyrr enn um nakrar vikur. Til tá verða fólkini flutt beinleiðis til Aberdeen. Tí verður eisini eftirlit við arbeiðsloyvum nú avgreitt umborð á pallinum. Annars hevur BP gjørt avtalur við fleiri føroyskar veitarar um at veita vørur og tænastur í sambandi við boringina.

Á fundi í Oljutinginum í vikuni segði Jonathon Trueman frá BP, at sannlíkið at finna olju er fyri 10%. Tó metti hann boringina sum sera spennandi. Mett verður at borast skal ígjøgnum 500 metrar av basalti, áðrenn farið verður longur niður. Kortið vísir tey ymsu løgini borað verður ígjøgnum teir 4700 metrarnar. Reyða lindin er basaltið. BP fer annars eftir tveimum málum, har tey meta olja ella gass er. BP sigur, at verður bara gass funnið, so er tað eisini gott.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
´Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn ella mjørki av og á, men onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og regn. Um kvøldið snarar hann í útsynning og minni vindur og ælingur. Hitin millm 7 og 10 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, mikudagin minni vindur av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 13 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 22 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 21 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. við Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/10 kl. 06⁰⁰ – 18/10. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,2°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 09/10 kl. 06⁰⁰– 10/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 88,0 mm

## Tiltøk í Miðlahúsinum

**Mikudagin 17 oktober kl. 16.00**
***Bragdið 60 ár***

**Mikudagin 17. Oktober kl. 19.30**
***Psykoterapiútbúgving***

**24. oktober**
***Demokratia***

**25. oktober**
***Føroyskt Lógarrit***

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Lesið Sosialin -tað loysir seg

## VESTFALLSKYRRINDI

13. oktober — Mánin longst frá jørðini
19. oktober — Fyrra kvarter
26. oktober — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19 . okt. | 00.52 | 13.29 | - | 12.29 | 00.07 | 12.44 | 02.52 | 15.29 | 03.52 | 16.29 | 11.44 | - | 10.44 | 23.21 | 01.07 | 13.44 | 02.07 | 14.44 | 00.37 | 13.14 | 01.52 | 14.29 |
| 20 . okt. | 02.06 | 14.42 | 01.06 | 13.42 | 01.21 | 13.57 | 04.06 | 16.42 | 05.06 | 17.42 | 00.21 | 12.57 | 11.57 | - | 02.21 | 14.57 | 03.21 | 15.57 | 01.51 | 14.27 | 03.06 | 15.42 |
| 21 . okt. | 03.18 | 15.39 | 02.18 | 14.39 | 02.33 | 14.54 | 05.18 | 17.39 | 06.18 | 18.39 | 01.33 | 13.54 | 00.33 | 12.54 | 03.33 | 15.54 | 04.33 | 16.54 | 03.03 | 15.24 | 04.18 | 16.39 |
| 22 . okt. | 04.01 | 16.22 | 03.01 | 15.22 | 03.16 | 15.37 | 06.01 | 18.22 | 07.01 | 19.22 | 02.16 | 14.37 | 01.16 | 13.37 | 04.16 | 16.37 | 05.16 | 17.37 | 03.46 | 16.07 | 05.01 | 17.22 |
| 23 . okt. | 04.44 | 17.05 | 03.44 | 16.05 | 03.59 | 16.20 | 06.44 | 19.05 | 07.44 | 20.05 | 02.59 | 15.20 | 01.59 | 14.20 | 04.59 | 17.20 | 05.59 | 18.20 | 04.29 | 16.50 | 05.44 | 18.05 |